# Mannarættindi

Nemingabók, síða 58-70

Førleikar:

- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Kopiera hetta spurnaskjalið út til allar næmingar í flokkinum. Eftir hetta telur lærarin ella ein næmingur upp svarini á talvuna ella í eitt skjal. Rokna síðani meðaltøl út fyri svarini. (Duga tit væl við KT, ber til at telja alt upp í Excel ella enntá koyra spurnaskjalið inn í Forms, ið telur upp av sær sjálvum. Spyrjið Nám, um tit ivast í onkrum.)

Kjakist síðani um úrslitini.

Tosið síðani um tað hvat tit halda um, at børn arbeiða. Nær arbeiða børn ov nógv? Verða børn viðfarin væl á arbeiðnum? Hvør er munurin á frítíðararbeiði og at hjálpa til við húsligum arbeiði?

---

**Spurnaskjal um frítíðararbeiði**

1. Hevur tú frítíðararbeiði? Ja ________ Nei ________

2. Hvussu nógvar tímar arbeiðir tú í meðal um vikuna? ______________________________________________ tímar

3. Hvussu nógv tjenar tú í meðal um vikuna? ______________________________________________________ krónur

4. Hevði tú arbeitt meiri, um tú fekst møguleikan fyri tí? Ja ________ Nei ________

5. Hvørjum arbeiðir tú við? ____________________________________________________________________

6. Hvat brúkar tú pengarnar til? ________________________________________________________________

| 7. Hevur tú nakra viðmerking til evnið? |
| --- |
| |